# Trukkundirvísing.

Á nógvum virkjum og arbeiðsplássum kemur og fer vøra allatíðina, eins og vøra og tilfar alla tíðina skal flytast aftur og fram.
Nógv av hesi vøru og tilfari kann verða rættuliga tungt og stórt og kann tað tá vera gott at hava ein gaffiltrukk tøkan.

Gaffiltrukkar eru, sum meginregla, gjørdir at lyfta og flyta vøru við.
Harumframt kunna teir eisini verða brúktir til onnur endamál, um teir hava ta røttu útgerðina.

Her kann nevnast:
- ✓ Sum krani,
- ✓ til kavarudding,
- ✓ sum sleipari,
- ✓ til persónlyfting,
- ✓ ella onnur endamál.

Sum meginregla er hetta bert er loyvt, um so er at (eyka)útgerðin, sum nýtt verður, er keypt frá tí sum hevur framleitt gaffiltrukkin og/ella at hann kann siga gott fyri hesum.

Ein onnur  meginregla er, at bert persónar við loyvisbrævi sum "trukkførari" hava loyvi at koyra gaffiltrukk.

***Arbeiði við trukki krevur kunnleika (Tilvildarlig mynd).***




Tá er lika mikið hvat gaffiltrukkurin verður nýttur til.

*Trukkroynd. (Tilvildarlig mynd)*



Loyvisbræv sum "trukkførari" til gaffiltrukk fæst frá Arbeiðseftirlitinum.

Miðskeiðis í 1980-unum var tað soleiðis, at undirvísarar frá AMU-skúlunum í Danmark komu til Føroyar at undirvísa, soleiðis at luttakaranir kundu fáa loyvisbræv sum "trukkførari".

Arbeiðseftirlitið byrjaði síðan sjálvt at hava hesi skeið seinast í 1980-unum, og hevur hetta verið soleiðis heilt fram til nú.

Arbeiðseftirlitið hevur nú givið loyvið til at onnur enn Arbeiðseftirlitið eisini kunna hava hesi skeið.

Fleiri hava víst hesum áhuga, og eru tveir, nú byrjaður. Teir eru:

***VIRGAR HVIDBRO***
***KROSSLÍÐ 6***
***100 TÓRSHAVN***

***KOYRIKORTIÐ  SP/F***
***V/ HANS JACOB HERMANSEN***
***TÓRSBYRGI 16***
***100 TÓRSHAVN***

Tað verður tó framvegis Arbeiðseftirlitið sum skrivar loyvisbrøvini.
Hettar verður gjørt eftir váttaðum lista frá góðkendum undirvísara.

Reglur um hvør og hvussu kann undirvísast eru at fáa frá Arbeiðs-eftirlitinum.

Á líknandi hátt kunna eisini onnur enn Arbeiðseftirlitið hava skeið, sum geva luttakarunum førleika til at fáa prógv sum "kranførari".
Hesi skeið eru tey sokallaðu kranførari D (upp til 25 tm) og kranførari E (yvir 25 tm) skeiðini (lastbilmonteraður krani).

Hesi skeiðini fáast hjá áðurnevnda:

***KOYRIKORTIÐ SP/F***
***V/ HANS JACOB HERMANSEN***
***TÓRSBYRGI 16***
***100 TÓRSHAVN***

Eisini her er reglan tann, at Arbeiðs-eftirlitið skrivar loyvisbrøvini eftir váttaðum lista frá góðkendum undirvísara.

**Tilvildarlig mynd**




## Arbeiðseftirlitið